# Minningarorð um
# Kirstin Vestergaard

17. januar 1931 - 5. oktober 2009



Tað er við tungum sinni, at eg skal festa penn fyri minningarorð um mína elskaðu systir.

Eg minnist altíð til tín, sum í hesari mynd, so vøkur, so mild og altíð góð við okkum systkin. Tú hevði eina sjáldsama gávu, altíð at fyrigeva øðrum, um onkur illstøða var komin ímillum.

Tað var altíð til tín man fór, tá ið man var tungur í sinni um okkurt og fekk ráð. Eitt minni havi eg um teg, tá ið eg sum blaðungur lá á Sanatorium fyri tuberklar. Tað vóru ikki nógv í vitjaðu meg, fólk tá í tíðini vóru rædd fyri tuberklum og hildu seg ofta aftur at vitja tey, ið sjúk vóru. Eg var ofta tungur í sinni, men tá ið so hurðin fór upp og inn komst tú Kirstin. Tað var sum ein sól kom á himmalin og títt blíða egnabrá vermdi langt inn í sálina.

Tú vart ikki bara vøkur í útsjónd men hevði eitt so vakurt menniskjaligt lyndi. Ring vóru boðini, tá ið tú Hjalgrim ringdi til mín við deyðsboðunum, men sum vit báðir vistu frammanundan, var ongin vón fyri bata, men eg var hjá tær teir seinastu dagarnar og at vitjaði teg á hospitalinum, og hóðast nógv viknað kundi tú smílast og minnast okkurt stuttligt frá fyrr av.

Eg veit at tit Birtha, Hjalgrím, Gurið, Fródi og Thorkil hava sorgina. Tit kunnu minnast eina góða mammu og vit systkin eina góða systir. Lat tað verða eitt minni um Kirstin, sum nú er farin har til sum ongin pína er longur, og har sum vit øll einaferð at møtast við tær.

**Bróðir tín Ólavur á Heygum**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Elinborg á Garðsendanum** frá Norðskála andaðist á Mørkini leygardagin, 67 ára gomul. Kistan fer av Mørkini í Norðskála kirkju týsdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 14. Sálmabókin verður nýtt. Tey, ið vilja minnast Elinborg, kunnu lata Mørkini eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Anna Midjord**, í Vági, ættað av Økrum, andaðist á Landssjúkrahúsinum, 63 ára gomul

**Sæbjørn Poulsen**, Tórshavn, andaðist sunnudagin, 53 ára gamal.

**Malan Djurhuus**, andaðist í Skúvoy, leygardagin 10. oktober, 72 ára gomul.

Kistan við **Eilif Lisberg** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju mikudagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

**Ási Jacobsen**, Tvøroyri, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnumorgunin 11. oktober, 68 ára gamal.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra systir

**Malan Djurhuus**

andaðist í Skúvoy
leygardagin 10. oktober 2009, 72 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum
mikudagin 14. oktober kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
hósdagin 15. oktober kl. 15.00.

*Familjunnar vegna*
**Systkini**





**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel. 341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo


# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu,
tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Olivia K. Joensen**
**Úti á Bø í Leirvík**

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni. Tøkk til starvsfólkið á Giljagarði, sum vóru so væl um hana tey árini, hon búði har. Tøkk til starvsfólkið á Klaksvíkar sjúkrahúsi, sum vóru um hana til tað síðsta. Tøkk fyri kransar, blómur, heilsanir og til tykkum, sum sendu gávu til Missiónshúsið. Tøkk til tykkum í Bygdarhúsinum, sum hjálptu til við ervinum. Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Carl, Eli, Petra, Jórun, Ólavur, Fríðfinnur og Óli Jákup**

# Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu,
tá góði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Petur Kristian Jacobsen**
**Leirvík**

andaðist og var jarðaður.

Tøkk til Sverra Steinhólm prest fyri góð og troystarrík orð í kapellinum. Marius Jacobsen og Una Næs prest fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til Heimið á Mýrunum.
Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til í sambandi við jarðarferðina og ervið, og tykkum sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til tykkum á Heiminum á Mýrunum í Runavík, ið tóku sær so væl av honum, ta tíðina hann var har.

*Familjunnar vegna*
**Bodil, Jógvan Jákup, Richard, Maria, Súsanna & Árni v/fam.**